

Tónleikur

# Móttikin við opnum ørmum

**Eftir eina eydnuríka tíð við nógvum framførslum, góðum ummælum og einari væl móttiknari fløgu, hava Boys in a Band nú fingið nýggjan bassleikara. Sunneva H. Eysturstein tosar her við Pætur Zachariasson, oddamann í bólkinum, og nýggja limin, Sakaris Joensen, um hvussu tað er at vera við í Boys in a Band og um ætlanirnar, ið liggja fyri framman**

SAMRØÐA
*Sunneva H. Eysturstein*
*sunneva@sosialurin.fo*

Boys in a Band hava fingið nýggjan bassleikara eftir at tann fyrri, Símun Skorastein, gavst í bólkinum í august mánaða. Nýggi bassleikarin eitur Sakaris Joensen og hevur spælt í væl umtóktum bólkum so sum Lama Sea, Guðrið Hansdóttir og The Story Ends. Harumframt er hann partur av elektronisku verkætlanini High Hat, ið hann hevur saman við Janus Rasmussen úr Bloodgroup. Og so ger hann eisini egnan elektroniskan tónleik undir ógvuliga jarðbundna navninum Sakaris.

Sakaris er sonur Martin Joensen og hevur eisini frá degi til dags givið sær tíð til at spæla saman við pápanum á ymsum konsertum. Eitt nú á ársins G! Mini og ólavsøkukonsert. Nú er hann so nýggjasti limurin í Boys in a Band og spældi seinasta leygardag sína fyrstu konsert við bólkinum í Reinsarínum.



*Pætur Zachariasson, oddamaðurin í bólkinum, og nýggja limurin, Sakaris Joensen*

**Hví hava Boys in a Band fingið nýggjan bassleikara, og hví hava tit valt júst Sakaris?**
PZ: Símun hevði ikki hug meira, so hann segði upp. Vit respektera allir avgerðina hjá honum. Sakaris hava vit møtt og tosa ofta við, tá vit hava verið í býnum.

SJ: Eg havi eisini verið til nógvar konsertir hjá Boys in a Band, tí at mær dámar væl tónleikin. Og eg haldi, at vit bara kennast púra náttúrligt ígjøgnum tónleikaranetverkið her. Haldi faktiskt, at allir føroyskir tónleikarar kenna hvønn annan.

PZ: Tá Símun segði upp, hugsaðu vit allir beinanvegin um Sakaris. Hann var tann mest ideelli, og tá vit spurdu hann, var hann ógvuliga optimistiskur. Vit hava síðani vant tríggjar ferðir vit honum, og hava verið fullkomiliga blástir umkoll, ja faktiskt bara flent, tí hann passar so perfekt inn og dugir allar sangirnar beinanvegin.

SJ: Eg hevði lurtað nógv eftir fløguni frammanundan, so eg dugdi faktiskt teir flestu sangirnar, áðrenn vit vandu fyrstu ferð. Men also... hetta er jú ikki jazzur, talan er um, so tað gekk skjótt at læra at spæla tónleikin hjá teimum.

PZ: hjá okkum!

SJ: Á ja. Hjá okkum.

**Hvussu er tað at koma uppí ein bólk sum Boys in a Band, og hvussu ávirkar tað hini tónleikaprojektini, ið ein hevur koyrandi?**
SJ: Eg skuldi faktiskt til Odense tann 1. september at lesa multimediadesign. Eg var eitt sindur fastur her og visti ikki, hvat eg vildi, so eg valdi bara tað, sjálvt um eg ikki visti so nógv um tað. Nakrar fáar dagar áðrenn eg skuldi fara avstað, ringdi Pætur og spurdi, um eg hevði hug at koma í bólkin hjá teimum. Tað leiddi meg til ein nokso intensan krossveg, men eg fann skjótt útav, at eg vildi royna meg við Boys in a Band. Eg var alt ov hálvhjartaður viðvíkjandi at fara til Odense, men við Boys in a Band fekk eg møguleika fyri at gera tað, ið eg ordiliga vil og tími. Eg var longu farin úr bólkinum hjá Guðrið, tí eg skuldi niður at lesa, og visti ikki heilt, hvussu tað bleiv við The Story Ends. Men so havi havi eisini onnur síðuting so sum High Hat, ið eg ætli at blíva við at hava koyrandi.

**Er tíð og pláss til, at mann sum limur í bólkinum kann gera onnur ting eisini?**
PZ: Vit eru ikki so heilagir, men hava altíð sæð bólkin hjá okkum sum eitt projekt. Og hevur mann yvirskot, skal mann sjálvandi gera onnur ting eisini. Vit byrjaðu Boys in a Band soleiðis og fara altíð bara at taka tað, sum tað kemur. Tað hevur stóran týdning fyri okkum, at mann hevur entusiasmuna við sær, og at mann er við, tí at mann tímir, og ikki tí at mann er noyddur. Og so skal mann helst eisini hava humor og kunna taka tingini við einum smíli. Bara mann er tann, sum mann er. Og tað er Sakaris, umframt at hann passar ordiliga væl inn í bólkin.

**Hvussu stuttligt er tað at vera við í Boys in a Band?**
SJ: Eg eri blivin móttikin við totalt opnum ørmum. Longu nú kenni eg meg ordiliga væl tilpass, tá vit venja. Og tað gjørdi eg eisini leygarkvøldið, tá eg spældi mína fyrstu konsert við